# ARB-Vegleiðing

# V-A001-2

**Útgongdsumstøður í sambandi við føst arbeiðspláss**

# 2003/01

# Arbeiðseftirlitið

## Hvat er ein ARB-Vegleiðing?

ARB-vegleiðingar vegleiða um hvussu reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini skulu skiljast/tulkast. ARB-vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum (lóg og kunngerðir),
- greiða frá hvussu krøvini í reglunum kunna lúkast í royndum,
- greiða frá vitan um tulkingar av reglunum í samband við dómar,
- greiða frá hvussu arbeiðsumhvørvislógin er samansett og hvørji øki hon umfatar.

## Er ein ARB-vegleiðing bindandi?

ARB-vegleiðingar eru ikki bindandi fyri virkir, trygdarskipan e.o., men vegleiðingarnar eru skrivaðar út frá reglum (lóg og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðseftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskila í eini vegleiðing.

Virkini kunna loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðseftirlitið vil tá meta um, um hesin háttur er líka so tryggur og í trá við reglurnar.

**Arbeiðseftirlitið**
**Boks 1134**
**FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: + 298 317811**
**Fax.: + 298 314489**
**T-post.: arb@arb.fo**
**Heimasíða: www.arb.fo**

**Útgongdsumstøður í sambandi við føst arbeiðspláss.**
Henda vegleiðing greiður frá krøvum til útgongdsumstøður í samband við føst arbeiðspláss.

Arbeiðsumhvørvislóggávan fastsetur, at arbeiðshøli og fólkahøli skulu hava trappur og útgongdir, sum tryggja, at starvsfólkið við eldsbruna og øðrum vandaumstøðum, sjálvi kunnu bjarga sær burtur frá vandaøkinum.

**Meginregla.**
Vanliga skulu vera minst 2 útgongdsmøguleikar. Eldsbruni ella roykur við eina av útgongdunum, skal ikki forða fyri nýtslu av hinari útgongdini. Tann eini útgongdsmøguleikin kann vera ein neyðútgongd. Ein neyðútgongd (neyðhurð) er ein útgongd, sum ikki verður nýtt dagliga, men sum kann nýtast í eini neyðstøðu, til dømis við eldsbruna.
Ein trappa kann tó vera einasti útgongdsmøguleiki fyri minni virkir (hægst 150 $m^2$) innan fyri skrivstovu ella lættari vinnu, um so er at trappan lýkur tey serligu krøv, ið bygningsreglugerðin setur.
Útgongdsvegir skulu leiða út til lendi, ella til aðra brunaeind, har útgongd er til lendi.
Útgongdsvegur gjøgnum fremmant leigumál krevur loyvi frá Arbeiðseftirlitinum.
Tað skal skilliga síggjast á innrættanini av bygninginum ella við skeltum, hvar útgongdirnar eru.
Útgongdsvegir skulu verða ivaleysa ljósir, antin við dagsljósi ella við el-ljósi.
Útgongdsvegir – eisini neyðútgongdir – eigur ein ótarnaður og vandaleysur at kunna fara ígjøgnum/framvið í teirra fullu breidd. Fríhæddin undir einum røri og líknandi má á ongun stað vera lægri enn 1,9 m. Omanfyri trinforkantarnar á trappum skulu verða minst 2 m fríhædd í gangilinju.
Neyðhurðar og eykatrappur mugu ikki forðast (blokerast) av innbúgvi, vørum, burturkasti ella líknandi.
Bygningsreglugerðin setur ávís krøv til útgongdsvegir, m.a. um at hesir eiga at vera brunatøkniliga úr hondum greiddir.

**Hurðar**
Hurðar í útgongdsvegum skulu vera ólæstar í arbeistíðini ella kunna latast upp innanífrá uttan nýtslu av lykli. Á neyðhurðum kann handtakið (vrideren) verða hult av einum plastkupli, sum kann sláast av (glas er ikki loyvt).
Dragihurðar ella lyftihurðar roknast ikki sum útgongdsmøguleikar. Sjálvvirkandi hurðar verða tó loyvdar íroknaðar, um so er at tær lúka nøkur krøv, ið tryggja, at hurðarnar undir øllum umstøðum kunnu virka sum rýmingarvegir. Millum annað skulu hurðarnar vera innrættaðar soleiðis, at tær av sær sjálvum latast upp og verða verandi opnar, er feilur, streymslit ella líknandi.
Hurðar frá hølum, har eitt størri tal av fólki er, eiga at latast upp úteftir. Í matarhølum, har fleiri enn 10 fólk eta samstundis, skal minst 1 hurð latast upp úteftir.
Frá ávísum ketilhølum og frá hølum, har arbeitt verður við heilsuvandamiklum, eldfimum ella spreingifimum evnum ella arbeiðsháttum, verður vanliga kravt, at minst ein útgongd er ein úteftirvend hurð, sum beinleiðis ella eftir eini trappu leiðir til lendi.
Hurðar til trappuhøli skulu vera sjálvafturlatandi og virka til nóg góða trygd móti útbreiðslu av eldi og royki.

**Trappur.**
Trappur skulu sum høvuðsregla vera í trappuhølum við hurð (útgongd) beinleiðis ella gjøgnum vindfang (dur) til lendi, ella til aðra brunaeind.
Trappur kunnu møguliga vera uttandura á bygninginum. Uttandura trappur skulu verða gjørdar úr beton, jarni ella øðrum tilfari, ið ikki brennur.
Tað eigur ongastaðni at vera meira enn 25 m til ta nærmastu trappuna og meira enn 50 m til ta næstu.
Høvuðstrappur skulu vanliga vera minst 1 m breiðar, eykatrappur minst 70 cm breiðar.

**Vindeygu og svalar (altanur).**
Vindeygu við ávísari stødd ella svalar kunnu nýtast sum neyðútgongd, um so er, at hæddin í mesta lagi er 2 m yvir lendi. Undirkarmur á vindeyga má hægst vera 1,2 m yvir gólvi. Vindeygað skal kunna latast upp ótarnað, og skal kunna fastlæsast opið. Tað skal altíð vera ótarnað atgongd til vindeygað ella svalan, og tað skal vera gjørligt, at sleppa frá vindeyga ella av svala til lendi, uttan at vandi stendst av hesum.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 8. januar 2003.

____________________________

Karl Joensen, stjóri (sign.)